Landssjúkrahúsið
Fo 100 Tórshavn

# Fysioterapeutur

Søkt verður eftir avloysara fyri fysioterapeut á Landssjúkrahúsinum frá 1. januar 2005 til og við 31. august 2005. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Fysioterapeutarnir á Landssjúkrahúsinum hava sum endamál saman við øðrum starvsbólkum, og í samstarvi við sjúklingin at bøta um fysisku, psykisku og sosialu støðuna.
Vit viðgera í størri mun innlagdar sjúklingar á skurð-, heiliráð-, og psykiatriskum depli, og í minni mun ambulantar sjúklingar innan øll øki.

Á fysioterapideildini eru 11,0 fulltíðarstørv. Yvirfysioterapeutur, deildarfysioterapeutur, fysioterapeutar og sjúkrahjálpari, tilsamans 14 fólk.

Vit søkja eftir fysioterapeuti við áhuga og kunnleika at arbeiða á heiliráðdeildunum. Vit vænta, at tú ert ágrýtin, hevur góð samstarvsevni, er opin, og er til reiðar at arbeiða neyvt saman við deildunum í heiliráðdeplinum.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Marjun Poulsen, Yvirfysioterapeut, ella Karin Djurhuus, deildarfysioterapeut, Tlf 304599 lok 5790.
Løn- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fysioterapeufelag Føroya og Fíggjarmálaráðið.

Freistin at søkja starvið er 20. desember 2004 kl 12.00

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv«, við avriti av prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

# Savnsleiðari

Starvið sum leiðari fyri Listasavni Føroya verður lýst leyst at søkja. Leiðarin tekur við starvinum tann 1. januar 2005 ella skjótast til ber.

**Savnsleiðarin**
- hevur ábyrgdina av dagliga rakstrinum og umsitir í samstarvi við stýrið listasavnið eftir teimum viðtøkum og reglugerðum, sum eru fyri stovnin
- ger framsýningarætlan og aðrar virkisætlanir fyri savnið, herundir fíggjar- og rakstraræltan,
- útvegar tilfar um savnið og tey listaverk, ið savnið eigur,
- virkar fyri góðum samskifti millum savnið, samstarvspartar savnsins, skúlar og almenningin yvirhøvur.

**Umsøkjarin**
- skal vera listfrøðingur við prógvi frá hægri lærustovni ella hava samsvarandi útbúgving og skal hava royndir innan listasavnsøkið,
- skal hava leiðsluførleika og góð samstarvsevni,
- skal hava hug og evni at royna nýggjar leiðir,
- skal duga at leggja soleiðis til rættis, at savnið framhaldandi verður eitt týðandi mentanarligt andlit burturi og heima.

**Setanartreytir**
Starvið er tíðaravmarkað í fimm ár við fyrsta árinum sum royndartíð og verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Stýrið setir starvið eftir tilmæli frá Listafelagi Føroya og Felagnum Føroysk Myndlistafólk.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Gunnar Hoydal, formann í stýri listasavnsins, á telefon 312849 ella á info@art.fo

**Umsóknin**
Skrivlig umsókn saman við prógvum, starvsroyndum og øðrum upplýsingum skulu vera stýrinum í hendi í seinasta lagi 21. des. 2004 og stílast til Listasavn Føroya, postrúm 1141, FO-110 Tórshavn.

**Listafelag Føroya**

*Listasavnið er tjóðlistasavn Føroya. Savnið er sjálvognarstovnur, sum verður rikin við rakstrarjáttan frá Føroya Løgtingi, Tórshavnar kommunu, stuðli frá greunnum og við egnari fígging. Endamál stovnsins er at savna og skjalfesta føroyska list og við skiftandi framsýningum at tryggja vitan um føroyska list í Føroyum og útlondum.*

**Finska Aðalkonsulatið**

# Finskur tjóðardagur 6. desember

# Stuðul

Í sambandi við, at finskur tjóðardagur er tann 6. desember, ber til hjá einstaklingum og feløgum at søkja um stuðul til vinnulig, mentanarlig ella ítróttarlig tiltøk ella verkætlanir. Endamálið við stuðulinum er at menna nevndu sambond millum Finland og Føroyar. Samlaði stuðulin, ið latin verður er kr 25.000.

Umsókn saman við einari lýsing av tiltakinum/ verkætlanini kann sendast til:

**Finska Aðalkonsulatið**
Hoyvíksvegur 74
100 Tórshavn
**Poul Michelsen**

# Starvsfólk til verkætlan

Serstovnadeildin søkir eftir starvsfólki til eina verkætlan á Eirargarði 16 BS, skjótast gjørligt. Talan er um at arbeiða niðursetta tíð, við skiftandi vaktum og arbeiði í vikuskiftum og halgidagar. Tey, sum kunnu søkja starvið, eru pedagogar, sjúkrarøktarfrøðingar, heilsuatstøðingar og pleygarar. Neyðugt er at hava royndir innan psykiatriksa øki.

Uppgávan er at stimbra og stuðla í fyrsta lagi einum brúkara, sum annars klárar seg sjálvan í gerandisdegnum.

Starvið verður lønt samnart sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Starvið er í fyrsta umfari tíðaravmarkað til 1. apríl 2005. Meira fæst at vita við at venda sær til Annu Johannesen, tlf. 215540.

# Frá Viðareiðis Skúla!

Av tí at okkara danska lærarapar fer niður aftur til Danmarkar, tørvar okkum tveir lærarar í tíðaravmarkað starv at undirvísa fulla tíð komandi ár: frá 02.01.2005 til 31.07.2005.

Løn sambart avtalu millum Føroya lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Umsókn og møgulig viðmæli skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 15. desember 2004 á middegi.

**Viðareiðis skúlastýri**
**v/ Lenu Heinesen**
**FO-750 Viðareiði**

Suðuroyar Sjúkrahús
FO-800 Tvøroyri

# Hjálparfólk

Vegna farloyvi verður søkt eftir hjálparfólki til fysiurgisku deild í tíðarskeiðinum frá 10. januar– 1. september 2005, møguliga við eini longjan til 1. september 2006.

Talan er um eitt starv við fullari arbeiðstíð.

Starvið er fjølbroytt og arbeiðsuppgávurnar ymsar, m.a. innkalling av sjúklingum, luttøka í venjingum av sjúklingum v.m.

Umsøkjarar skulu hava lokið prógv sum sjúkrahjálpari, heilsuatstøðingur ella líknandi.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til yvirfysioterapeut John Rødgaard, tlf. 371133, lokal 115.

Umsóknir við avriti av møguligum prógvum skulu sendast til:

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**Umsjónarmannin**
**FO-800 Tvøroyri**

Umsóknarfreist 15. desember 2004.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo